## Nógv mál um siðamisbrot

Løgreglan á Reykjavíkarleiðini kannaði í fjør næstan 200 mál um siðamisbrot. Av teimum var talan um í 48 neyðtøkur, og í 62 málum var talan um kynsligan ágang ímóti børnum, skrivar Vísir. Løgreglan kannaði eisini meiri enn 900 mál um rúsevni. Av teimum vórðu umleið 100 skrásett sum serliga álvarssom, og tað størsta var tað sokallaða Pólstjørnumálið, ið er tað størsta í Íslandi nakranmtíð. Løgreglan kannaði eisini tvey morð í fjør.



## Misnøgd tíðindafólk

Í Íslandi eru tíðindafólk misnøgd við, at myndugleikarnir royndu at avmarka teirra møguleikar at lýsa málið um ta seinnu ísbjørnina, sum bleiv skotin. Blaðmannafelagið sigur millum annað í einum skrivi til myndugleikarnar, at løgreglan stongdi almennan koyriv eg fyri at forða tíðindafólki at taka myndir av teirri deyðu bjørnini. Stjórnin hevur sagt, at hon royndi at forða óhepnum myndum, sum kundu skaða umdømi Íslands úti í heimi.



*Marin Vang fer frá sum sjúkrarøktarstjóri 1. juli í ár. Hon hevur starvast á Landssjúkrahúsinum í átta ár, men fer nú at royna aðrar leiðir*

# Ov lítið samskifti á Landsjúkrahúsinum

**Eftir 25 ár innan leiðslu, fer Marin Vang frá sum sjúkrarøktarstjóri á Landsjúkrahúsinum. Marin Vang greiðir frá sínari tíð innan føroyska sjúkrahúsverkinum**

SJÚKRAHÚSVERKIÐ
*Bjørk Olsen*
*bjork@sosialurin.fo*

1. juli fer Marin Vang frá sum sjúkrarøktarstjóri aftan á átta ár. Marin Vang fór niður á skúla fyri 35 árum síðani at lesa sjúkrarøktarfrøði. Í 35 ár starvaðist hon í Danmark, har av fimm teirra í Grønlandi. Marin Vang er nú 62 ára gomul og hevur seinastu átta árini verið sjúkrarøktarstjóri á Landsjúkrahúsinum. 62 ára gamla Marin Vang dugir enn ikki at siga, um tað er lættin ella sorgin, ið fyllur mest í sinninum. Viðgongdi sjúkrarøktarfrøðingurin hevur eina 25 ára langa roynd innan leiðslu og fer nú at geva hesar víðari við at undirvísa innan leiðslu og fyriseting. Marin Vang greiðir Sosialinum frá føroyska sjúkrahúsverkinum ígjøgnum sínum egnum eygum.

### Alment og privat

Marin Vang hevur starvast innan bæði privatum og almennum sjúkrahúsverkum og greiðir frá, at tað eru so at siga teir somu trupulleikarnar, ið eru.

- Tað almenna sjúkrahúsverkið, sum í Føroyum, hevur sjálvandi summar fordingar, ið ikki høvdu verið, um sjúkrahúsið hevði verið privat. Lógirnar og búskapurin kann vera ein forðing, um mann ikki dugir at brúka hesi rætt, sigur Marin Vang, sjúkrarøktarstjóri.

- Ein trupulleiki á Landssjúkrahúsinum er, at búskapurin ikki verður nóg væl prioriteraður. Í dag fylgir búskapurin bygnaðin og ikki sjúklingin. Leiðslan dugir ikki nóg væl at raðfesta, greiðir Marin Vang frá. Hon sigur, at sjúkrahúsið eigur at flyta fokus frá búskap og leiðslu yvir á kvalitetssikring og sjúkling, har evsta ábyrgdin liggur hjá einum sjúkrahúsi.

### Magtkampar

Við nógvum royndum innan leiðslu, sigur Marin Vang frá, at ein stór ábyrgd – kanska ein stórur trupulleiki hjá nógvum, er at samskifta. Skapa samskifti millum leiðslu og starvsfólk og samskifti ímillum starvsfólk. Er einki samband millum leiðsluna og starvsfólkið, koma magtkamparnar.

- Á Landsjúkrahúsinum eru nógvir fakbólkar, og allir vilja hava ábyrgd og avgera. Sjúkrarøktarstjórin greiðir frá, at virkar samskiftið ikki í einari slíkari støðu, sum á Landssjúkrahúsinum, so gongur galið. Læknarnir eru ein sera sterkur fakbólkur, tí at tað ber illa til at fáa nýggjar læknar, sum nú er. Av tí at so nógvir fakbólkar eru samlaðir á einum stað, ber illa til at umganga kampar, men samskiftið ger av, hvar markið gongur.

- Alla mína tíð á sjúkrahúsinum hevur verið ein støðug samráðing millum leiðslu og starvsfólk, leggur Marin Vang afturat.

- Man sleppur ikki undan, at ósemjur eru, og tá ið ósemjan ikki kann loysast, er tað leiðslan, ið tekur avgerðina, og hesa støðuna skal man royna at sleppa undan.

- Á sjúkrahúsinum eru fleiri løg av leiðslu. Ovast í landstýrinum, síðan ovasta leiðslan á sjúkrahúsinum, deildarleiðararnar o.s.v, og tí er truplari at samskifta her enn aðrastaðni.

### Ongar mannagongdir

*Feildiagnosur og skeivar viðgerður í føroyska sjúkrahúsverkinum, hoyrir mann ofta um. Hvussu sær støðan út?*

- Eg dugi illa at siga tær, um tað er verri her enn á øðrum sjúkrahúsum. Eg trúgvi, at trupulleikarnir henda vegna ringa kommunikatión. Tá ið sjúklingarnir skulu inn ella úr skipanini, skifta á aðra deild ella úr Klaksvík til Havnar, sigur Marin Vang. Hon heldur, at sjúkrahúsini skulu setast undir einari leiðslu, tí tað hevði givið samskiftinum betri sømdir, og hetta heldur hon vera sera avgerandi.

- Av ringari samskifting ella ongari verða mannagongdirnar ikki fylgdar upp sigur Marin Vang. Tað er ov langt í millum starvsfólkunum á landsjúkrahúsinum.

### Starvsfólkið

- Tað er sera trupult at menna seg á sjúkrahúsinum. Tað kostar nógv at senda starvsfólk til Danmarkar, og starvsfólkið hevur viðhvørt ikki kent seg viðurkent.

- Á mínum øki hava vit arbeitt nógv við útbúgvingarpolitikkinum, og vit hava fingið eftirútbúgving til hjartasjúkrarøktarfrøðingar til Føroyar, sigur Marin Vang, sum í eitt tíðarskeið var stjóri á sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya.

- Neileikin hevur eisini ávirkað alt sjúkrahúsið, sum tað er. Konstantu álopini ávirka leiðsluna, sum lukkar av. Leiðslan er ov vánalig at brúka krittikin konstruktivt, greiðir sjúkrarøktarstjórin frá. Mann eigur at duga at brúka álopini jaligt, tí at álopini koma óansæð.

Marin Vang fer nú at geva sína vitan og royndir frá sær innan undirvísing. Hon hevur ikki avgjørt, um tað verður innan tað privata ella almenna enn.